# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801




# Toyota væntar sær nógv av 2009

**Í síðstu viku vitjaði stjórin í Toyota Danmark A/S, Bas Kasteel í Føroyum. Vitjanin var m.a. í sambandi við nýggja bygningin hjá Reyni Service í Hoyvík**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Toyota stjórin, Bas Kasteel, sum var á vitjan í Føroyum, sigur, at hóast búskaparkreppuna væntar hann sær nóg av 2009. Nógvar nýggjheitir eru á veg. Nýggjur Toyota Avensis, og tveir heilt nýggir bilar, minibilurin IQ og Urban Cruiser, iðer ein SUV, sum er eitt sindur minni enn RAV4.

Báðir bilarnir sum eru krasjtestaðir, Avensis og minibilurin IQ, fingu fimm stjørnur frá EuroNCAP.

Hóast Toyota byrjaðu at framleiða bilar í 1937, komu teir ikki til Evropa fyrr enn í 1963, tá teir komu til Danmarkar, sum fyrsta landið í Evropa. Sama ár komu teir til Føroya. At vit í Føroyum hava havt Toyota í Føroyum frá byrjan, heldur Toyota stjórin vera áhugavert. Eisini at Toyota hava ligið á odda í nógv ár og seldu mest bilar í Føroyum í fjør.

Bas Kasteel sigur, at hóast teir eru vorðnir heimsins størsti bilaframleiðari hevur kvaliteturin á sjálvum bilunum og tænastan til kundan framvegis mest at siga. Bygningurin hjá Reyni Service í Hoyvík er bygdur eftir sama standardi sum aðrir Toyota bygningar í Evropa og tænastan er á sama støði.

Bas Kasteel er hálendingur og hevur arbeitt fyri Toyota í nógvum londum.




*Bas Kasteel, stjóri hjá Toyota Danmark, Eivind av Reyni, stjóri hjá Reyni Service, og Jørgen Eg Andersen, marknaðarkonsulentur hjá Toyota Danmark*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Suzuki Intruder

**Intruder eru nakrar av flottastu cruisarunum hjá Suzuki. Umframt 1800 útgávurnar, fæst Intruder nú í 1500 útgávuni M1500**

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Japanska Suzuki verksmiðjan er ein av heimsins størstu motorsúkkluverksmiðjum við einum stórum programmi við nógvum ymiskum motorsúkklum. Ein av nýggjheitum frá Suzuki er Intruder M1500.

M1500 er ein tekniskt framkomin motorsúkkla við trygdini í hásæti. Talan er um eina flotta súkkla við klassiskum designi og er sera væl útgjørd við t.d. SCAS (Suzuki Clutch Assist System), sum gera tað lætt at skifta gir og at nýta koblingina.

Intruder M1500 er ein súkkla, sum tekur seg væl út, er góð at sita á og at koyra. Hon er kvik og koyrieginleikarnir eru heilt í topp, eisini við ferð í svingum. Instrumentini eru løtt at avlesa undir koyring. Motorurin er ein 1,5 litra vatnkøldur V2 (4-takt) við 80 hk.

Tað er MC-Sølan í Slættanesgøtu, sum umboðar Suzuki motorsúkklurnar. Fyritøkan umboðar motorsúkklumerkini Kawasaki og Ducati. Á heimasíðuni: www.mc-solan.fo eru upplýsingar um úrvalið av t.d. motorsúkklum og skutarum og hópin av leikjum til aðrar MC-síður. Suzuki Intruder M1500 kostar 122.000 krónur.



*Suziki Intruder M1500*



